# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Status í valstríði – ein roynd

Fólkatingsvalstríðið nærkast endanum. Tað tykist savna seg um ávís evni, ið ivaleyst fara at gerast heit evni í løgtingsvalstríðnum komandi. Eitt heitt evni er støða Føroya í ríkinum. Allir flokkar hava eina meining um hetta. Sjálvstýrisflokkarnir hava eitt sindur trupult við at greiða frá, hví tað er so umráðandi at júst teir fáa umboð Fólkating. Málini og stóru spurningarnir skulu jú ikki avgerast í Danmark men í Føroyum. Kortini verður heitt á veljaran um at tryggja einum av sjálvstýrisflokkunum umboðan á danatingi. Áhugavert er at staðfesta, at bæði Fólkaflokkurin og serstakliga Sjálvstýrisflokkurin eru nógv radikaliseraðir við atliti at sjálvstýrismálinum, og báðir hava í valsendingum mælt til loysing innan ávíst áramál. Hinvegin hevur ídni loysingaflokkurin, Tjóðveldi, niðurtónað loysingaretorikkin og hevur lagt doyin á praktiskan politikk og á tey ítøkiligu úrslit, sum Norðuratlantsbólkurin kann vísa á. Hetta er ikki minni áhugavert.

Javnaðarflokkurin hevur tann trupulleika, at hann, sum hevur leiðsluna av samgonguni, skal ella heldur seg skula verja rikna politikkin hetta løgtingsvalskeiðið. Her er nógv gott at vísa á, eitt nú stabilitetur og ein góður búskapur, men veljarin er ikki so áhugaður í fortíðini, hann vil hoyra um framtíðina. Her hevur knípt hjá Javnaðarflokkinum, men hann hevur tó í endaspurtinum fingið fatur í einum góðum enda, og tað er vælferðarpolitikkurin, Flokkurin ger ivaleyst beint í at vísa á, at góði búskapurin má nýtast til vælferð. Javnaðarflokkurin hevur mangan havt trupult við at forklára sína støðu til ríkisfelagsskapin, men hesaferð tykist flokkurin í valstríðnum vilja bjarga sær við yvirtøkulógini, sum jú er ein blankotjekkur til loysing, um nakar skuldi ynskt hetta stigið. Hervið er avgerðin flutt til Føroya, har hon sjálvandi eigur at vera. Klára valevnini at balansera millum sínar sambandsveljarar og sínar sjálvstýrisveljarar eftir hesi eggini, so kann Javnaðarflokkurin fáa eitt gott val.

Sambandsflokkurin hevur tann fyrimun, at hann í fólkatingsvalstríði kann tóna reint flagg og vísa á greiðar linjur. Øll vita, hvør boðskapurin er. Hinvegin hevur fríggjaríið við Tjóðveldi seinastu tíðina gruggað eitt sindur, og boðskapurin er vorðin kámur og ógreiður. Miðflokkurin, hvørs boðskapur er, at ein vil blanda seg uppí málini, áðrenn tey koma til Føroya, er smartur og kann hetta geva atkvøður hjá teimum ikki heilt fáu, sum halda alt ilt koma úr Danmark. Hetta verður eitt sera spennandi val ikki minst tí flestu flokkar nú opið siga seg til reiðar undir ávísum treytum at gerast parlamentariskt støði undir danskari stjórn.

**Sosialurin**

## Laksáfoss blandar búskap og valstríð

Val X



**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður

Magni Laksáfoss hevur ein keðiligan tendens til at lyfta seg sjálvan upp, við at seta sínar samgongufelagar í ringt ljós. Nú seinast leggur hann Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin undir at vilja boygna av valfepuri, tí teir vilja svíkja eina avtalu um avgjaldshækkingar á tubbaks-, sukur og fitivørum. Hann hevur meylað upp í saman um hetta bæði í Rás2 og í Útvarpinum og nú aftur í Sosialinum.

Nei, Laksáfoss, Javnaðarflokkurin stendur sjálvsagt við hesa semjuna, sum varð gjørd í smb. við fíggarlógararbeiðið. Hetta kunnu bæði floksformaðurin og formaðurin fyri tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum vátta. Eins og eg sjálvur, sum eg eisini vísti á í løgtinginum. Okkara framsøgumaður var í farloyvi tá alt fíggjarlógararbeiðið fór fram, og er tað eisini eitt mistak at hann ikki er kunnaður nógv væl um tað sum staklutir í uppskotinum. Tað gjørdi hann eisini vart við seinni undir løgtingsviðgerðini av málinum.

Avgjaldsuppskotið kom enntá frá mær sjálvum og Javnaðarflokkinum undir fíggjarlógararbeiðinum, sum alternativ til tey heldur beisku uppskotini frá Fíggjarmálaráðnum, m.a. um at skerja rentustuðulin til húsa- og bústaðarlán, skerjing av inntøkutrygdini hjá fiskimonnum og mangt annað.

Við at skera 70 mió og harvið toppin av skattalættanum og við hesum avgjaldsuppskotinum upp á 30 mió, fingu vit samanlagt einar 100 mió. til at fíggja rættiliga stóru raðfestingar á vælferðarøkinum. Javnaðarflokkurin er fegin um fíggjarlógaruppskotið, júst tí raðfestingarnar til m.a. heilsu-, almanna- og skúlamál eru serstakliga stórar, kanska tær størstu nakrantíð. Tí standa vit sjálvandi við uppskotið um avgjaldshækkingarnar.

Hetta er eisini eitt skilagott heilsupolitiskt uppskot, men tað skal eg vísa á aðrastani.

## Nú stendur um føðingina!

**EYÐUN MOHR VIDERØ**



Nú skal vinnunevnd løgtingsins fyrsta dagin hava fund um uppskotið: Undirsjóartunnil til Sandoynna.

Sjálv løgtingsviðgerðin gav okkum ávísa vón um, at eitt positivt úrslit fór at spyrjast burturúr.

Vinnunevndin skal nú helst hava hoyringar við ymsar viðkomandi partar og persónar, og út frá tí fáa vit so at síggja, hvussu tilmælið frá vinnunevndini ljóðar til løgtingið.

Talan er um tvey uppskot í løgtinginum um sama mál, men ymist er, hvussu arbeiðið skal skipast fíggjarliga.

Fyri okkum í Sandoynni hevur tað minni týdning, hvør formur fyri fíggingin verður valdur, meðan tað avgerandi er, at arbeiðið fer í gongd beinanvegin, t. v.s. neyðuga fyrireikingin og útbjóðing, og at sjálvt arbeiðið byrjar!

Vit hava hoyrt ymiskar politikarar sagt, at henda farleið ikki hastar so nógv fyri okkum, tí vit hava rímuliga gott ferðasamband við ferju. Men hetta er ikki rætt!

Vit hava nú fingið veruleikan at síggja viðvíkjandi tunnlunum til Vágar og Norðoyar, hvussu alstóran týdning fyri hesi øki at yvirliva í dagsins samfelag tunnlarnir hava. Sjálvsagt høvdu tey fáu fólkini, sum annars vóru eftir í hesum økjum, klára seg við ferjusambandið, sum var, men allur trivnaður og framgongd vildi steðgað og gingið aftur á hondina, meðan við verandi møguleikum hesi øki fjálgast og mennast til gagns og frama fyri landið!

Á sama hátt gerst neyðugt at útbyggja farleiðina til Sandoynna við tunnli. Sandoyggin við sínum fólkagrundarlagi, við sínum upplandi nær miðstaðarøkinum er eitt týðandi íkast til samlaðu gagnnýtsluna av okkara lítla landi.

Tí er svarið um tann høga kostnaðin:

Vit hava ikki ráð til at lata vera!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.